# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Vest Norden Travel Mart 2008



**Ferðavinnustevnan Vest Norden Travel Mart 2008 varð hildin í Reykjavík í døgunum 15. til 17. september**

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Sámal Bláhamar*

**Reykjavík:** Vodafone-høllin í Reykjavík var í døgunum 15. til 17. september karmar um Vest Norden Travel Mart 2008. Tað eru Føroyar, Ísland og Grønland, sum skiftast til at skipa fyri hesi ferðavinnustevnu, sum verður hildin eina ferð um árið.



*Tordis Arthursdóttir, fyrrverandi ferðavinnustjóri á Akranesi, og Sámal Bláhamar frá Toru Tourist Traffic*

Á stevnuni vór umleið 600 keyparar og seljarar. Úr Føroyum vóru tilsamans 13 feløg og stovnar innan ferðavinnuna.

Næsta ár verður tað Grønland, sum kemur at skipa fyri, og tá verður Vest Norden Travel Mart hildin í Keypmannahavn.

Vest Norden Travel Mart varð í ár hildin fyri 23. ferð.



*Magni og Hannebeth Garðalíð frá Viljin Tours á Húsum*



*Jóan Karl Høgnesen á básinum hjá føroyska sjómansheiminum Ørkin í Reykjavík*




*Maria Samson og Kent L. Christensen báinum hjá 62N Travel*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Thomina Vang Hansen**, vanliga nevnd Mina, úr Nólsoy, andaðist á Landssjúkrahúsinum 20. september, 94 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Nólsoyar kirkju hósdagin klokkan 13. Tey, vilja minnast Minu kunnu lata Vistarheiminum í Torfinnsgøtu 41 eina gávu, konta í Føroya banka.

## Dagurin

**25. september. Kleofas**. Annar av lærusveinunum, sum á veg til Emmaus hittu hin upprisna (Luk. 24. 13-35).